Sajdak skorar í Finnlandi

Tað hepnaðist ikki heilt so væl, tá GÍ í fjør styrkti sær um álopspartin við pólverska Tomasz Sajdak. Bert tvey mál gjørdist talan um í fjør, og tað var ikki nóg mikið at sannføra leiðsluna í felagum um, at hann skuldi verða partur av nýggja Víkingi. Ístaðin hevur Sajdak gjørt sáttmála við finska HJK Helsinki, og har hevur hann longu gjørt vart við seg. Sajdak var nevnliga maðurin, sum skoraði fyrsta málið, tá HJK um vikuskiftið vann 2-0 á útivølli móti Mariehamn. Talan var um fyrsta umfarið í finsku landskappingini.

WBA aftur millum tey bestu

Eitt stig var nóg mikið hjá West Bromwich, tá teir í gjárkvøldið skuldu tryggja sær uppflyting til Premier League. Á heimavølli fingu teir vitjan av Southampton, sum framvegis er í niðurflytingarvanda. Southampton kom á odda í 77. minutti, men Chris Brunt javnaði fyri heimaliðið sjey minuttir seinni. Eina stigið sendur West Bromwich á eitt deilt fyrsta pláss saman við Stoke City. Eitt umfar er eftir í The Championship, og kappingin um hitt uppflytingarplássið er framvegis hørð. Her liggur Stoke best fyri, men tapa teir næsta dyst, samstundis sum Hull vinnur sín dyst, verður tað gamla felagið hjá Julian Johnsson, ið sleppur at spæla í Premier League komandi kappingarár. Hóast Hull kann koma ájavnt WBA í stigum, so er málmunurin hjá WBA somikið góður, at uppflytingin longu er veruleiki.

HB-B36:

Fyrsta slagið um høvuðsstaðin

Við einum sigri kann HB av álvara krøkja grannarnar av í oddastríðnum, meðan árstalsfelagið hinvegin enn eina ferð skal til prøvtøku

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Higartil hava HB og B36 dystast tríggjar ferðir í ár. Tveir vinardystir og ein dystur í kappingini um Løgmanssteypið eru allir endaðir við javnleiki

Undan kappingarbyrjan vóru kanska ikki tey heilt nógvu, sum roknaðu við, at talan skuldi verða um oddabrak, tá HB og B36 dystaðust.

Júst tey bæði liðini hava meira enn nakar annar sett sín dám á føroyskan fótbólt seinnu árini, men eitt ættarliðsskifti hjá B36 bar við sær, at vónirnar til teir hava verið skrúvaðar nakað niður.

Eftir fýra heimadystir er B36 tó framvegis væl við, og teir siga seg aftur fara eftir øllum, nú mótstøðan kemur frá grannunum.

Óbroyttar manningar

HB varð hinvegin frá byrjan roknað millum favorittarnar, og við 10 av 12 møguligum stigum hava teir eisini livað upp til hetta heitið. Eisini hóast talan bert gjørdist um javnleik á Toftum sunnudagin.

Og hjá báðum pørtum verður hópurin helst neyvt tann sami hesaferð, sum hann var um vikuskiftið.

Hjá HB er Marcyn Dawid framvegis skaddur, men Tróndur Vatnhamar prógvaði seinast, at hann vælk og virðiliga er førur fyri at loysa av í málinum. Longur frammi á vøllinum er Páll Mohr Joensen við at koma seg eftir skaða, men tað er tó ivasamt, um hann er við í hópinum hesaferð.

Hjá B36 var Ingi Højsted einasta fráveran seinast, og hann er enn ikki tøkur. Allir hinir í hópinum vandu tó longu aftur mánakvøldið, og so er spurningurin bara, um Heðin Askham blandar kortini á sama hátt hesaferð.

Uppflytarin kann hótta meistaran

Eftir at hann var sjúkur fríggjakvøldið er NSÍ liðformaðurin tøkur aftur, nú væl uppløgdu fuglfirðingarnir koma at vitja

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er ógvuliga gott fótbóltslag í Fuglafirði. Uppflytararnir í ÍF hava staðið seg væl, og nú teir fara til Runavíkar, ætla teir sær at fáa stig:

-Vit verða fegnir, um vit fáa stig við okkum til hús aftur, og sjálvandi vilja vit fegnir vinna øll stigini, sigur miðverjin Bartal Eliasen, sum skoraði annað málið, tá ið ÍF sunnudagin á heimavølli spældi 2-2 ímóti KÍ.

Allir fuglfirðingarnir, sum vóru við ímóti KÍ, eru tøkir. Tað er ikki frítt, at tað er kapping um plássini. Sunnudagin var Knút Vesturtún í miðverjuni saman við Bartali. Undanfarnu ferðirnar hevur John Thomsen verið í tí leiklutinum.

Fuglfirðingar siga seg vera tilvitaðar um, at talan hesa ferð verður um stóra uppgávu, og at tað ræður um at taka sjálvsálitið frá undanfarnu ferðunum við til Runavíkar og at hava fokus á avbjóðingini, sum stendur fyri framman.

Í 2006 endaði ÍF aftast í bestu deildini. Tað árið spældu fuglfirðingar tvær ferðir við Løkin. Í 7. umfari taptu teir 6-1, og í 10. umfari taptu teir 3-0.

Higartil hevur tað ikki hilnast meiri enn passaligt hjá NSÍ, sum ikki hevur fingið spælið at hingið saman soleiðis, sum teir fegnir vilja hava tað at gera. Ein av spurningunum, sum hongur í leysum lofti, er, hvussu fremstu álopsplássini skulu verða mannað. Fríggjakvøldið vórðu bæði Andy Olsen og Øssur Dalbúð skiftir inn, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir, og tað kann væl vera, at teir báðir fara at fáa meiri spælitíð mikukvøldið, enn teir fingu fríggjakvøldið.

Fríggjakvøldið var NSÍ liðformaðurin Óli Hansen ikki við orsaka av sjúku. Óli vandi í gjárkvøldið. Í kvøld halda teir í NSÍ frí, og tá ið teir í annaðkvøld fara at renna inn á vøllin at spæla ímóti uppflytarunum, verður Óli Hansen ímillum teir fyrstu ellivu.

Skála-B68:

Botnbrak á Skála

Ein sigur er tvingandi neyðugur hjá báðum pørtum, tá nummar átta og tíggju á stigatalvuni bresta saman mikukvøldið

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

- Tað er einki at ivast í, at hetta er ein av teimum dystunum, sum vit skulu vinna. Nú hava vit tapt tvær ferðir á rað, og tí ræður um at fáa stig á heimavølli.

Soleiðis sigur Bárður B. Danielsen, nú Skála ger seg til at spæla tað, sum líkist einum botnbraki móti B68 mikukvøldið.

Men tað verður eitt sindur skerdari manning, at Skála fer undir dystin.

Alexandur Johansen, sum heldur ikki var við á Sandi, er ikki tøkur av arbeiðsávum, og Erland B. Danielsen hevur skaða at dragast við, og tí verður hann neyvan tøkur til dystin.

Hjá B68 er danski Jacob Bymar størsta ivamálið. Áleyparin noyddist heilt tíðliga av vøllinum, tá B68 spældi móti HB sunnudagin, og tað er ivasamt, um hann enn er førur fyri at spæla.

Øssur Hansen er avgjørt ein av royndastu monnunum hjá B68, og hann er ikki í iva um týdningin, sum dysturin mikukvøldið hevur.

- Vit hava bara eitt stig enn, so hetta er ein dystur, sum vit helst skulu vinna. Og í øllum førum er sera umráðandi, at vit ikki tapa, sigur hann.

Og tað er við góðum treysti, at Øssur og liðfelagarnir fara undir uppgávuna á Skála.

- Hóast vit hava tapt tríggjar av fýra ferðum, so hevur hugburðurin verið fínur seinastu dystirnar. Og halda vit fast í hesum, so haldi eg avgjørt, at tað eru góð útlit fyri dystinum, sigur hann.